# TILTØK

**Gudstænastur**
**6. sunnudag e. trinitatis**
Vesturkirkjan: Emil Olsen kl. 11.00. Kór luttekur
Argir: Heri Joensen kl. 11.00, altargongd
Kirkjubøur: Heri Joensen kl. 12.30
Havnar kirkja: Erland Beder kl. 11.00
Nólsoy: Sonja Klein kl. 12.00
Hvalvík: Mogens Tilsted Christensen kl. 12.00
Kollafjørður: Petur M. Rasmussen kl. 11.00
Gásadalur: David Johannesen kl. 11.00, altargongd
Bøur: Inga Poulsen Dam kl. 12.00
Klaksvíkar Sjúkrahús: Niels Pauli Danielsen kl. 10.00
Norðoya Røktarheim: Niels Pauli Danielsen kl. 14.30
Christianskirkjan: lestur kl. 11.00
Oyndarfjørður: Jógvan Fríðriksson kl. 12.00, altargongd
Gøta: Martin R. Jacobsen kl. 11.00
Tvøroyri: Jónsvein Bech kl. 11.00, altargongd
Sandvík: Jónsvein Bech kl. 18.00, altargongd
Sumba: Ólavur Rasmussen kl. 12.00
*Á Tvøroyri og í Sandvík gongur talvan fyri Hina føroysku Sjómansmissiónina*
Sandur: Jákup R. Hansen kl. 12.00
*Í Haldórsvíkar kirkju gongur talvan fyri Sjómansmissiónina*

**Ólavsøkugudstænastan 29. juli**
Havnar kirkja: Inga Poulsen Dam kl. 11.00

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 er morgunmøti. Símun Pætur á Torkilsheyggi talar. Barnaansing er samstundis.
www.hebron.fo

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Á møtinum sunnukvøldið talar Reimund Langgaard.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11.00: Møti við barnavælsignilsi/sjónvarpsupptøku. Kl. 18.00: Møti, har nýggju hornini verða vígd av Hedvig Sønsterli, drekkamunnur aftaná.
Ólavsøkuaftan: Útimøtir á Vaglinum kl. 17.00 og 23.00.
Ólavsøkudag: Útimøtir á Vaglinum kl. 16.00 og kl. 22.30.
Møti í salinum kl. 20.00. Øll eru vælkomin.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 11.00: Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Jesus – virðiligari og betri.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30: Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00: Hámessa v/ Jude Kulas í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.
Ólavsøkuaftan kl. 7.30: Messa
Ólavsøkudag kl. 10.00: Messa v/ Kjeld Pollestad í Mariukirkjuni

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti.
Øll eru vælkomin
www.rhema.fo

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag kl. 17.00: Landsbøn. Í morgin kl. 11.00: Morgunmøti v/ Maibritt Djurhuus, Ólavsøkudag kl. 16.00: Lovsangur í Grasagarði.
www.filadelfia.fo

**Grasagarður!**
Ólavsøkudag kl. 16.00 skipar Filadelfia fyri lovsangi í Grasagarði.

**Ebenezer**
Í kvøld kl. 20.00: Ungdómsmøti.
Sunnudagin:
Kl. 10.00: Breyðbróting.
Kl. 18.00: Evangeliskt møti.
Kl. 21.00: Útimøti.
Ólavsøkuaftan:
Kl. 21.00: Útimøti.
Kl. 22.30: Opið hús í Ebenezer.
Ólavsøkudag:
Kl. 10.00: Møti, har Jógvan Júst Rasmussen talar.
Kl. 16.00: Barnamøti.
Kl. 21.00: Útimøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið, Tórshavn**
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ teimum ungu.
Ólavsøkuaftan kl. 18.00: Møti v/ Pól Johannesen. Kvinnukórið syngur. Kl. 23.00–04.00: Opið hús við café, lovsangi og andakt – øll eru vælkomin.
Ólavsøkudag kl. 18.00: Møti v/ Regin Høgnesen. Meinigheitskórið syngur.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13.00: Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 17.00: Møti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti við breyðbróting.
Telefonandaktin 424741

**Samkoman Lívdin**
Ongi møtir verða 27. juli og 3. aug.
Heimasíðan: www.livdin.fo

**Lívsins Orð**
Evangeliskt møti verður sunnudagin kl.19.00.
Einki ungdsómsmøti verður mánakvøldið.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnukvøldið kl. 19.00: Møti við John Myllhamar. Øll eru vælkomin.
Sunnudagin 3. aug. verður møti við felagsmáltíð í Meinigheitshúsinum. Vit byrja kl. 17.00 við sangi og øðrum. Kl. 17.30 verður nátturði. Kl. 19.00 verður møti við Jógvan Steintún, sangkreftir av Skála luttaka. Innsavning til húsið. Barnaansing er undir møtinum. Aftaná verður drekka.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Í kvøld kl. 21.00: Opið hús.
Sunnukvøldið kl. 19.00: Møti v/ Henning Hansen o.fl.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Missiónshúsið í Oyndarfirði**
Sunnudagin kl. 17.00: Møti v/ John S. Mylhamar, trúboðara.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl.11.00 er møti við Kaj Meinar og Fríðbjørg Michaelsen (barnaansing er undir møtinum).
Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli, kl. 17.30: Bønarløta, kl. 18.00: Møti, kl. 21.00: Ungdómsmøti.
Øll hjartaliga vælkomin
www.kuff.fo

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20.00: Bíbliutími. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti við Terja og Birgit Nielsen.
Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møtið.
Innsavnan til húsið.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00: Breyðbróting, kl. 18.00: Evangeliskur fundur, kl. 21.00: Útifundur um viðrar.
Ónsdagin kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarfundur.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11: Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.
Mánakvøld kl. 21: Bønarmøti. Frá kl. 21-23 verður bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja, um tær tørvar forbøn.

**Missiónshúsið í Vági**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Danmark: Sæby bibelcamping**
29. og 30. juli kl.19.30 talar Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari, á Sæby bibelcamping. Øll eru vælkomin.

**Frá Kunningarstovuni í Saltangará og Runavíkar kommunu: ÚTI-KONSERT**
Í dag, 26. juli, kl. 12.30 verður úti-konsert á P-økinum við Runavíkar kommunu.
Á skránni er: Glorybox og Trummuspælarar úr Gambia.
*Kunningarstovan í Saltangará og Runavíkar kommuna*

**Felagið Tórshavn: Útferð**
*Útferð út í Hest.* Farið verður av Gomlu Rætt kl. 8.45 (leið 101 fer av Farstøðini kl. 8.00). Havið heit og góð gonguklæði og matpakka við. Tilmelding sum skjótast.

**Matiné í Havnar kirkju**
Leygardagin 26. juli kl. 11.30 verður matiné. Kórið »Sólarmagn« av Velbastað, ið verður stjórnað av Fróða Sandoy, syngur fjølbroytta skrá.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
**Frá 1. juli til 18. august hava vit opið frá kl. 13.00-17.00.**
Á ólavsøku verður fotoframsýning av útoyggjamyndum í kjallaranum í Tilhaldinum hjá Hjalmari Waag Høgnesen.
Á miðhæddini verður møguleiki at fáa sær ein drekkamunn og okkurt heimabakað.
Tilhaldið hevur átikið sær at hava móttøkuhúsið opið á ólavsøku.
Opið verður 28.-29. juli kl. 15-19.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

## 90 ÁR

Ólavsøkuaftan, mánadagin 28. juli verður Torkil Strøm í Vági 90 ár. Hann heldur dagin saman við familjuni.

## 80 ÁR

Ólavsøkuaftan 28. juli verður Petur Christiansen, Tórshavn, fyrrverandi borgarstjóri, 80 ár. Dagurin verður hildin á Lágargarði saman við familjuni.

## SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 5. august hava Elisabeth Hvítklett og Jógvan Joensen Sørvágur verið gift í 25 ár.

Dagurin verður hildin í heiminum leygardagin 2. august við morgunmati frá kl. 8.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## PRÓGV

13. juni fingu Ingibjørg Poulsen og Birgit Nónklett prógv sum »smykkudesignarar« á Seminarium for håndværk og design í Nørre Sundby.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Hvør, ið er vreiður inn á bróður sín, skal verða sekur fyri dóminum.*
Matt. 5,22.

Kristus hevur ikki avtikið lógina, so at hon ikki longur skuldi verið galdandi. Tvørturímóti hevur Hann sýnt okkum, at hon veruliga er galdandi, ikki bara sum ein útvortis regla - sum landsins lógir - men líka inni djúpast í hjartanum. Tað er hetta, Hann lærir okkum í fjallaprædikuni.

Tað fyrsta dømi, Hann tekur fram, er fimmta boð: Tú skalt ikki sláa í hel. Tað sigur hin borgaraliga lógin eisini. Lóg samfelagsins greinar út, hvat ið meint er við morð og dráp, og hvussu ið tað verður revsað. Vandin er nú, at tú heldur, at tú hevur fylt allari rættvísi, um tú ikki hevur gjørt nakað, sum er revsivert sambært lóg samfelagsins. Nógv halda, at kristindómur inniheldur okkurt um tað at liva rætt og sømiliga sambært galdandi lóg og alment góðkendum siði. Tað er mistakið, sum Jesus her tekur upp og brýtur sundur. At sláa í hel er ikki bara at drepa og hella út blóð. Tað er líka ringt við sjálvum huginum til at gera tað. Ella við teimum mildari hættunum, sum vit koma við fyri at raka onnur menniskju, t.d. við at skelda tey út ella útseta tey fyri harðari sálarligari viðferð við at arga, háða ella vera ónærisligur ímóti teimum. Og revsingin er ikki bara tað, sum ein dómstólur her á fold kann áseta. Tann endaliga avleiðingin er, at tú verður æviga skildur frá Guði.

Ein kann sostatt vera fullkomiliga rættvísur sambært øllum ytru lógum og krøvum og tó vera burtur frá Guði og mistur fyri alla tíð. Fariseararnir og teir skriftlærdu vóru sannførdir um, at teir gjørdu alt, sum kundi verða kravt av teimum. Og nógv menniskju í kristinheiminum eru sannførd eins og teir. Men Jesus sigur okkum, at um vit ikki hava eina betri rættvísi at koma við, so koma vit als ikki inn í himmiríkið. Liva vit eftir lóg rættvísisisins og viðurgjaldsins, so koma vit eisini at verða dømd eftir henni, og tá gongst illa hjá okkum øllum.

Men hvør er tá hin betra rættvísin? Tað sigur Jesus ikki her. Í fjallaprædikuni talar Hann ógvuliga lítið um hana, men er hon sett sum treyt allastaðni. Tað finnst eingin annar vegur enn hann, sum førir inn í ríkið fyrigevingarinnar. Vit mugu skilja, hvussu illa ið statt er, so at vit verða fátæk í andanum og fara at hungra og tysta eftir rættvísi. Tá kunnu vit koma fram á hina dýrabara perluna. Vit kunnu skilja, hví ið Jesus bjóðar okkum at koma til sín. Og vit kunnu taka ímóti rættvísi Hansara og síðan fara at liva við Honum. Tað er tá, vit kunnu koma til sættis við ein bróður uttan at hava fingið rætt mótvegis honum. Tað er tá, vit verða fús til skjóta semju uttan at noyðast at ganga og bíða eftir, at hin skal ásanna, hvat ið hann hevur gjørt skeivt, ella biðja um fyrigeving fyri tað. Vit eru sjálvi vorðin fríkend og eru sloppin út úr fongslinum, sjálvt um vit vóru sek í bæði vreiði og hørðum orðum. Tað einasta portur, sum sleppast kann ígjøgnum út úr fongslinum, førir út til ríkið fyrigevingarinnar. Og har livir tú í tí nýggja levnaðinum.

**Niels Pauli Danielsen**



# TILTØK

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.30
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Javni**
Skrivstovan er *stongd vegna summarfrí.* Opið er aftur 11. august 2003.
Hevur tú atrokandi boð ella spurning, so ring til lim í starvsnevndini ella økisnevndini.
Heimasíðan: www. javni.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er farin í feriu frá 26. juni til 1. september

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 26. juli: Runavík, tlf. 448016
Sunnudagin 27. juli: Skála, tlf. 441490
Ólavsøkuaftan 28. juli: Fuglafjørður, tlf. 289038
Ólavsøkudag 29. juli: Eiði, tlf. 423006

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.

## BRÚDLEYP

Í dag, 26. juli, kl.10.00 giftast í Vágs kirkju Barbara Brattaberg, Vágur og Pauli Trond Petersen, Vestmanna. Brúdleypið verður hildið í VB húsinum kl.12.00

Í dag, 26. juli, kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Heidi Nystrøm í Dali og Kurt Fróði Jacobsen. Veitsla verður fyri innbodnum í Pálstovu kl. 19.00.

Í dag, 26. juli, kl. 15.00, giftast í Hvalbiar kirkju, Poula Næs, Hvalba og Rúni Thomsen, Froðba, búsitandi á Eiði. Veitsla verður í Roynhøllini kl. 19.00.

Í dag, 26. juli, kl. 15.00 giftast úti í Grøv í Klaksvík Anja Isaksen og Bogi Laksáfoss. Vælkomst verður í Skálanum kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin. Um ikki viðrar, verður vígslan í Betesda.

Í dag, 26. juli, kl. 16.00 giftast í Fuglafirði Magda Lambaa, Fuglafirði, og Birol Altinok, Odense. Tey, ið ynskja at heilsa uppá brúðarparið, eru vælkomin í Felagslonina í Fuglafirði kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Í dag, 26. juli, giftast Brynhild Kalsø Hansen og Simon Lund Andersen.
Brynhild er dóttur Ásu og Villa Hansen, Sakskøbing.
Brúdleypsadressa: Kastanievej 21, 4990 Sakskøbing

Í dag, 26. juli, kl.15.00 giftast í Mariukirkjuni í Sønderborg, Annika Mellemgaard, Klaksvík og Søren Hedegaard Jessen, Sønderborg. Veitslan verður fyri innbodnum. Brúdleyps adr. Møllegade 80, 6400 Sønderborg.

Í dag, 26. juli, kl. 14.00 giftast í Havnar kirkju, Ann Mari Karbech Mouritsen, Tórshavn og Martin Eg Hoffmann, Ruds Vedby, Danmark. Veitsla verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum.

Í dag, 26. juli, kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Rini Petersen, Skopun, og Sámal Sivertsen, Klaksvík. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum.

Í dag, 26. juli, kl. 15.00 giftast í Sørvágs kirkju Halla Joensen, Sørvági, og Gutti Gulfoss, Hoyvík. Veitslan verður í B36-húsinum fyri innbodnum.

Í dag, 26. juli, giftast í Grundtvig Kirke í Esbjerg, Maiken Festirstein, Klaksvík, og Arnfinn Hansen, Norðragøta. Brúdleyps-adressa: Toftsvej 32, 1 th, Esbjerg.

Í dag, 26. juli, kl. 17 giftast í Vesturkirkjuni Leona Ellefsen, ættað úr Sørvági, og Kári Nilssen, Lopra. Veitslan verður fyri innbodnum í Róðraneystinum á Argjum kl. 19.00.

Leygardagin 2. august kl. 17.00 giftast í Kirkjubøar kirkju Rikke Bak og Leif Sørensen. Brúdleypið verður hildið í Roykstovuni í Kirkjubø.

Leygardagin 2. august giftast í Marstal kirkju Dorthe Weber úr Marstal og Rúni F. Fjallstein av Argjum. Brúdleypsadressan er Lærkegade 12, 5960 Marstal.

Leygardagin 2. august giftast Annika Midjord, Argir, og Jacob Trans, Keypmannahavn. Vígslan verður kl. 15.00 í samkomuni Immanuel, Brekkutún 3, Hoyvík, og veitslan verður fyri innbodnum í Pálsstovu kl. 18.00.

Leygardagin 2. august kl. 14.00 giftast í Klaksvík Poula Andorsdóttir Isaksen og Kári Poulsen, bæði úr Klaksvík. Døgurði verður fyri innbodnum. Vælkomst verður í Skálanum kl. 21.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, biðjast vinarligast siga frá á tlf. 456515, 227340, 455950 ella 213668 í seinasta lagi 25. juli.

Leygardagin 2. august kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Sigrid Røsvik og Olaf Vesturgarð, bæði úr Hoyvík. Veitslan verður fyri innbodnum í Róðrarneystinum á Argjum kl. 18.00.

Leygardagin 2. august kl. 16.00 giftast í Elim í Søldarfirði Evi Hallursdóttir Jacobsen úr Skálabotni og Faber Isaksen úr Søldarfirði. Veitsla, sum áður var lýst at verða í Kappróðrarneystinum á Glyvrum, verður flutt í Ítróttarhøllina á Skála kl. 19.00.

Leygardagin 2. august kl. 17.00 giftast í Leirvíkar missiónshúsi Noomi Højgaard Joensen, Leirvík, og Øssur Egholm, Streymnes. Brúðarparið verður at hitta frá kl. 21.00 í LÍF-húsinum (Leirvík) og ikki sum áður lýst í heiminum.

Leygardagin 9. august kl. 11.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Gudrun Óladóttir Poulsen og Steinbjørn Zachariassen. Vælkomst verður í Skálanum kl. 13.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 226206, 222658, 455839 ella 455658 áðrenn 2. august.

Leygardagin 9. august kl. 14.00 giftast í Berøa Irdi Hansen, Saltangará, og Ken Nónklett, Glyvrar. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 17.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá innan 2. august á tlf. 507652, 448073 ella 448149 eftir kl. 18.00.

Leygardagin 16. august kl. 16.00 giftast í Sands kirkju Arnleyð Tungá og Bergleif Sólsker, bæði av Sandi. Veitslan verður hildin í Samljóð í Skopun kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, biðjast vinarliga siga frá á tlf. 361632, 320487, 361650 ella 258889 í seinasta lagi 1. august.


**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




Leygardagin 26.07. kl. 21$^{30}$
Leygardagin 26.07. kl. 23$^{59}$
Sunnudagin 27.07. kl. 21$^{30}$
Sunnudagin 27.07. kl. 23$^{59}$




Leygardagin 26.07. kl. 18$^{30}$
Leygardagin 26.07. kl. 23$^{45}$
Sunnudagin 27.07. kl. 18$^{30}$
Sunnudagin 27.07. kl. 23$^{45}$




Leygardagin 26.07. kl. 20$^{45}$
Sunnudagin 27.07. kl. 20$^{45}$




Leygardagin 26.07. kl. 19$^{00}$
Sunnudagin 27.07. kl. 19$^{00}$

**ÓLAV-SØKA**
Á ólavsøku verða hesir filmar sýndir, og tíðirnar verða lýstar í vindeyganum og á telefonsvararanum
TERMINATOR 3
JUST MARRIED • HULK
BRUCE ALMIGHTY
ANGER MANAGEMENT